# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 13. januar 2021 |
| Mál nr.: | 19/00574 |
| Málsviðgjørt: | EFR |
| Ummælistíð: | 13/01/21-28/01/21 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at seta úr gildi løgtingslóg um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan**

Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan verður sett úr gildi 1. juli 2021.

.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Tann 2. mai 2006 samtykti Løgtingið, at Hoyvíkssáttmálin kundi verða staðfestur Føroya vegna. Sáttmálin byggir á eina ætlan um at fremja búskaparligu viðurskiftini millum Ísland og Føroyar og at samskipa búskaparligu menningina í londunum báðum. Sáttmálin bindur Føroyar og Ísland saman í eitt felags búskaparøki, har vørur, tænastur, persónar og kapitalur kunnu flytast frítt millum londini, og har allur mismunur vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna er bannaður.

Undir tingviðgerðini av lógaruppskotinum um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan varð umrøtt, hvussu sáttmálin skuldi góðkennast og útinnast; hvørt hetta skuldi gerast við yvirskipaðari løgtingslóg ella við uppskoti til samtyktar, samanhildið við broytingum í ymsum serlógum, sí løgtingsmál nr. 15/2005.

Fyri at tryggja samsvar millum altjóðarættarligu bindingarnar sambært sáttmálanum og innlendis lóggávu á víðfevnda sáttmálaøkinum, metti landsstýrið, at Hoyvíkssáttmálin átti at verða útintur við yvirskipaðari løgtingslóg, og varð sáttmálin tí lagdur fyri Løgtingið sum lógaruppskot heldur enn uppskot til samtyktar. Eftir ynski frá Løgtingsins Uttanlandsnevnd, avgjørdi landsstýrið harumframt at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera broytingar á nøkrum týðandi lóggávuøkjum, sum sáttmálin hevur ávirkan á, m.a. á málsøkjunum hjá táverandi Vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, soleiðis at sáttmálin samstundis kundi verða útintur í serlóggávu.

Millumtjóðasáttmálar, sum landsstýrið hevur gjørt við onnur lond, verða vanliga lagdir fyri Løgtingið at góðkenna sum uppskot til samtyktar, og neyðugar lógarbroytingar verða gjørdar í lóggávuni, ið sáttmálin hevur ávirkan á. Í galdandi rundskrivi um lógarsmíð verður mælt frá at gera millumtjóðasáttmálar til løgtingslóg, uttan í heilt serligum føri. Hetta kemst m.a. av, at vandi er fyri, at ivi verður um rættarstøðuna, um t.d. onnur føroysk lóggáva gongur ímóti tí, sum er ásett í millumtjóðasáttmálanum, sbr. pkt. 6.7 í rundskrivinum.

Í álitinum til løgtingsmál nr. 15/2005 løgdu bæði meirilutin og minnilutin í Løgtingsins Uttanlandsnevnd dent á, at uppskotið ikki á nakran hátt skuldi gerast fordømi fyri sáttmálagerð frameftir. Meirilutin tók kortini, við ávísum broytingum, undir við leistinum, tí talan var um fyrsta sáttmálan av slíkum slag. Minnilutin mælti til heldur at leggja sáttmálan fyri Løgtingið við uppskoti til samtyktar. Í tí sambandi varð víst á, at sáttmálin í Íslandi varð lagdur fyri Altingið sum uppskot til samtyktar, og hevur hetta síðani verið nevnt fleiri ferðir sum grundgeving fyri, at Hoyvíkssáttmálin eigur at verða settur úr gildi sum løgtingslóg, m.a. í sambandi við tingviðgerðina av løgtingsmáli nr. 87/2018, uppskot til samtyktar um at siga upp Hoyvíkssáttmálan og tingviðgerðina av løgtingsmáli nr. 46/2019, uppskot til samtyktar um at taka aftur uppsøgn av Hoyvíkssáttmálanum.

Síðani Hoyvíkssáttmálin og løgtingslógin um sáttmálan fingu gildi tann 1. november 2006 eru eisini gjørdar fleiri broytingar fyri at tryggja, at sáttmálin verður útintur í serlógum og kunngerðum. Somuleiðis hava danskir myndugleikar tillagað kunngerðir, ið galda fyri málsøki, sum ikki eru yvirtikin. Hesar eru nakrar av teimum lógum og kunngerðum, sum eru tillagaðar samsvarandi sáttmálanum:

- løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir,

- løgtingslóg nr. 64 frá 27. apríl 2001 um vinnu,
- løgtingslóg nr. 53 frá 28. apríl 2000 um vatnið í Sumbiarbergholinum,
- løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn (Realin),
- løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping,
- løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996 um tryggingarvirksemi,
- løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald,
- løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum v. m.,
- løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald,
- løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka,
- løgtingslóg nr. 93 frá 4. oktober 1984 um biografar,
- løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum,
- kunngerð nr. 24 frá 16. mars 2001 um veterinert eftirlit við innflutningi av matvørum úr djórum,
- kunngerð nr. 58 frá 30. apríl 2002 um veterinert eftirlit í sambandi við samhandil, inn- og útflutning av djóraúrdráttum og øðrum úrdráttum, sum ikki eru ætlaðir til matna v.m.,
- kunngerð nr. 143 frá 22. oktober 2018 um starvsfólkaumboðan í partafeløgum og smápartafeløgum,
- bekendtgørelse nr. 178 af 27. februar 2011 om islandske advokaters tjenesteydelser på Færøerne, og
- bekendtgørelse nr. 179 af 27. februar 2011 om islandske advokaters etablering på Færøerne.

Eisini eru ikki-lógarfestar mannagongdir, tulkingar og siðvenjur lagaðar til Hoyvíkssáttmálan, harav nakrar eftir viðgerð í felagsnevndini undir Hoyvíkssáttmálanum.

Haraftrat kann nevnast, at stjórnarráðini, sambært pkt. 1.2.2.8 í rundskrivi um lógarsmíð, í hvørjum einstøkum føri skulu meta um, hvørt lógaruppskot samsvara við Hoyvíkssáttmálan. Við hesum má roknast við, at flestu lógarbroytingar og uppskot til nýggjar løgtingslógir seinastu árini taka hædd fyri bindingunum sambært Hoyvíkssáttmálanum.

Samanumtikið verður mett, at tað ikki er neyðugt við løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan fyri at tryggja, at sáttmálin verður útintur í innlendis lóggávu. Tí verður skotið upp, at seta løgtingslógina um Hoyvíkssáttmálan úr gildi.

Hóast Hoyvíkssáttmálin verður settur úr gildi sum løgtingslóg, so fær hetta ikki ávirkan á tær altjóðarættarligu skyldur, sum landsstýrið við Hoyvíkssáttmálanum hevur bundið seg at halda mótvegis íslendsku stjórnini.

Broytingin inniber, at borgarar frameftir ikki kunnu stiðja rætt beinleiðis á ásetingarnar í løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan. Kortini verður mett, at neyðugu heimildirnar í flestu førum eru fingnar til vega í serlóggávu, og at rættarstøðan tí í stóran mun verður tann sama. Harumframt kann ein altjóða sáttmáli, hóast hann ikki er útintur í føroyskari lóggávu við *inkorporering* ella *umskriving*, eisini nýtast av t.d. dómstólum sum tulkingaríkast, sí í hesum sambandi eisini § 5 í heimastýrislógini og § 55 í stýrisskipanarlógini.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Við § 1 í løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 góðkendi Løgtingið, at Hoyvíkssáttmálin kundi verða staðfestur Føroya vegna, samsvarandi § 52 í stýrisskipanarlógini.

Sáttmálateksturin varð settur í løgtingslógina í fullum líki, og sambært § 2 í løgtingslógini hevur Hoyvíkssáttmálin gildi í øllum yvirtiknum málum, ið sáttmálin fevnir um. Hetta er tó sbrt. § 2, stk. 2 ikki galdandi fyri broytingar, sum felagsnevndin ger í sáttmálanum sambært grein 7, stk. 2 og grein 8, stk. 2 og atknýtt frumskjøl og yvirlýsingar til sáttmálan.

Í § 3 er ásett, at løgtingslógin skuldi fáa gildi sama dag, sum sáttmálin kom í gildi, sbr. gildiskomuásetingarnar í § 13, stk. 1 og 2 í sáttmálanum.

Hoyvíkssáttmálin er mest víðfevndi fríhandilssáttmáli, Føroyar hava við onnur lond, og byggir á eina ætlan um at fremja búskaparligu viðurskiftini millum Ísland og Føroyar og at samskipa búskaparligu menningina í londunum báðum. Sáttmálin bindur Føroyar og Ísland saman í eitt felags búskaparøki, har vørur, tænastur, persónar og kapitalur kunnu flytast frítt millum londini, og har allur mismunur vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna er bannaður. Hesar ásetingarnar eru at rokna sum kjarnin í sáttmálanum.

Hoyvíkssáttmálin hevur tó frá byrjan eisini havt nøkur undantøk frá meginreglunum. Her kann serliga verða tikið fram, at Ísland og Føroyar kundu varðveita ávísar avmarkingar viðvíkjandi ognarrætti hjá útlendingum í fiskivinnuni, sum vóru galdandi, tá ið sáttmálin varð undirritaður.

Ein felagsnevnd er sett sambært grein 8 í sáttmálanum at tryggja, at ætlanirnar við sáttmálanum verða framdar, og at sáttmálin virkar á munagóðan hátt. Felagsnevndin kann við samtykki gera av at broyta grein 5-7 í sáttmálanum, umframt frumskjølini til sáttmálan. Felagsnevndin er mannað við embætisfólkum úr føroyska og íslendska uttanríkisráðnum.

Eisini skipar sáttmálin í grein 9 Hoyvíksráðið, har ráðharrarnir við ábyrgd fyri sáttmálanum árliga hittast og kunnu tryggja, at ætlanirnar við sáttmálanum verða framdar.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at seta løgtingslógina um Hoyvíkssáttmálan úr gildi, soleiðis at sáttmálin ikki longur hevur lógargildi.

Mett verður, at rættarstøðan verður greiðari, tá rættindi og skyldur, ið stava frá sáttmálanum, og sum borgarar kunnu stiðja rætt á, framganga beinleiðis av serlóggávu og ikki av yvirskipaðu løgtingslógini um at seta Hoyvíkssáttmálan í gildi.

Tað hevur onga ávirkan á gildið hjá sáttmálanum, at løgtingslógin verður sett úr gildi. Sáttmálin kann bert verða uppsagdur sambært teimum mannagongdum, ið eru ásettar í sáttmálanum, og sambært viðmerkingunum til § 52, stk. 2 í stýrisskipanarlógini skal landsstýrið hava góðkenning frá Løgtinginum fyri at siga upp sáttmála, sum Løgtingið hevur góðkent.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við uppskotinum verður løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan sett úr gildi. Hetta inniber, at sáttmálin frameftir ikki fer at hava lógargildi, eins og hann hevur í dag. Ístaðin verða sáttmálaásetingarnar útintar í serlóggávu, sum longu í fleiri førum er lagað til Hoyvíkssáttmálan, síðani hann fekk gildi tann 1. november 2006. Við hesum kunnu likamligir og løgfrøðiligir persónar frameftir ikki stiðja rætt beinleiðis á lógina um Hoyvíkssáttmálan.

Mett verður, at rættarstøðan við broytingini verður greiðari, og tað ikki verður sami vandi fyri ivamálum í sambandi við tulking av sáttmálanum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið verður sent til ummælis hjá stjórnarráðunum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið fær ikki beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men samlaða lógarverkið á økinum verður einfaldari, tá Hoyvíkssáttmálin ikki longur hevur lógargildi.

Hóast løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan verður sett úr gildi, so varðveitir landsstýrið galdandi altjóðarættarligu skyldurnar mótvegis íslendsku stjórnini sambært sáttmálanum.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Av tí at Hoyvíkssáttmálin varð settur í gildi í sum løgtingslóg, er sáttmálin partur av føroyskum rættarreglum og hevur sama rættarvirknað sum onnur lóggáva. Verður løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan sett úr gildi, broytist henda rættarstøðan, og kunnu likamligir og løgfrøðiligir persónar ikki longur stiðja rætt á løgtingslógina um Hoyvíkssáttmálan. Mett verður tó, at landsstýrið í stóran mun hevur gjørt neyðugu broytingarnar í serlóggávu, soleiðis at tey rættindi, ið løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan í dag veitir vinnuni, framvegis verða galdandi.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Av tí at Hoyvíkssáttmálin varð settur í gildi sum løgtingslóg, er sáttmálin partur av føroyskum rættarreglum og hevur sama rættarvirknað sum onnur lóggáva. Um løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan verður sett úr gildi, broytist henda rættarstøðan, og kunnu likamligir og løgfrøðiligir persónar ikki longur stiðja rætt á lógina. Mett verður tó, at í stóran mun eru neyðugu broytingarnar gjørdar í serlóggávu, soleiðis at tey rættindi, ið løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan veitti borgarum, framvegis eru galdandi.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Mett verður, at uppskotið er sambæriligt við viðkomandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

#### 1) Hoyvíkssáttmálin

Ongi krøv eru í altjóðarætti um, hvussu sáttmálar skulu útinnast í innlendis lóggávu. Hvørt land ger av á hvønn hátt hetta verður gjørt, bert tað verður gjørt soleiðis, at samsvar verður millum altjóða skyldur hjá viðkomandi landi sambært einum sáttmála og sambært innlendis lóggávu, sbr. eisini grein 27 í Wien-sáttmálanum um sáttmálarætt, sum ásetur, at ein stjórn ikki kann sleppa sær undan at lúka altjóða skyldur vísandi til, at heimild ikki er í innlendislóggávuni til tess.

Síðani Hoyvíkssáttmálin fekk gildi í 2006, eru fleiri broytingar gjørdar í føroyskari lóggávu og siðvenju. Við hesum broytingum verður mett, at føroysk lóggáva nú í stóran mun livir upp til

altjóðarættarligu bindingarnar sambært sáttmálanum, hóast løgtingslógin um Hoyvíkssáttmálan verður sett úr gildi.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður, at tær flestu neyðugu broytingarnar í føroyskari lóggávu eru gjørdar til tess at tryggja, at markaforðingar verða avtiknar, soleiðis at bindingarnar sambært Hoyvíkssáttmálanum mótvegis Íslandi eru loknar. Mett verður tí ikki, at tað fær ávirkan á støðuna, at sáttmálin verður settur úr gildi sum løgtingslóg.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | | Nei | Nei | [redacted] |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Skotið verður upp, at løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan verður sett úr gildi tann 1. juli 2021.

Verður lógin sett úr gildi, inniber hetta, at §§ 1-3 í lógini eisini fara úr gildi. Niðanfyri verður í stuttum greitt frá innihaldinum í hesum ásetingum.

Við § 1 í løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan samtykti Løgtingið, at sáttmálin kundi verða staðfestur Føroya vegna. Hóast lógin verður sett úr gildi, og við hesum eisini § 1 í lógini, fær hetta ikki ávirkan á gildi sáttmálans.

Hoyvíkssáttmálin kann bert verða uppsagdur sambært mannagongdini í grein 12, stk. 1 í sáttmálanum, og sambært viðmerkingunum til § 52, stk. 2 í stýrisskipanarlógini skal landsstýrið hava góðkenning frá Løgtinginum fyri at siga upp sáttmála, sum Løgtingið hevur góðkent, sbr. eisini løgtingsmál nr. 87/2018.

Sambært § 2 í løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan hava sáttmálaásetingarnar gildi í øllum yvirtiknum málum, ið sáttmálin fevnir um. Landsstýrið gjørdi sáttmálan við Ísland saman við donsku stjórnini, tí at sáttmálin fevnir um ikki-yvirtikin málsøki. Hetta var eisini orsøk til, at sáttmálin varð gjørdur eftir heimastýrislógini og ikki eftir løgtingslóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera. Í Danmark er sáttmálin lýstur við *BKI nr. 13 af 29. august 2013, Bekendtgørelse af aftale af 31. august 2005 med Island om etablering af et fælles økonomisk område*.

§ 3 í løgtingslógini um Hoyvíkssáttmálan er gildiskomuáseting, ið er tengd at gildisásetingini í 13 í sáttmálanum. Eftir at neyðugu mannagongdirnar sambært grein 13, stk. 1 og 2 í sáttmálanum vórðu avgreiddar, fekk sáttmálin gildi tann 1. november 2006. Striking av lógarásetingini um gildiskomu fær ikki ávirkan á gildi sáttmálans fyri sáttmálapartarnar, sbr. eisini omanfyri.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, tann 13. januar 2021

Jenis av Rana<br>landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen